

www.oljan.fo

**Jan Müller** 18 - 10 - 2012

# Minni framleiðsla í norskum øki

Fyribilstøl vísa, at oljuframleiðslan í norskum øki í september var heili 15 prosent minni, enn forsøgnin fyri mánaðin segði, og at framleiðslan av gassi var minni enn í august. Dagliga oljuframleiðslan var í meðal 1.514.000 tunnur, og tað var 318.000 tunnur minni enn í august, sigur Oljustýrið. Gassframleiðslan var 6,9 milliardir rúmmetrar ella 1,2 milliard rúmmetrar minni enn í august. Um orsøkina til, at framleiðslan í september var 15 prosent niðan fyri metingina, sigur Oljustýrið, at tað komst millum annað av viðlíkahaldi og tekniskum trupulleikum á fleiri leiðum. Ein onnur orsøk er, at eftir ætlanini skuldi framleiðslan á leiðunum Yme og Skarv geva eitt íkast til framleiðsluna í september, men hesar leiðirnar koma ikki í gongd í hesum árinum. Sum heild er framleiðslan í ár tvey prosent niðan fyri forsøgnina fyri árið, og Oljustýrið ásannar, at tað verður torført at røkka teirri ásettu forsøgnini fyri 2012, skrivar Aftenbladet.

